ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1 – 3
100 Tórshavn

20. nov. 2023
Mál: 23/22558
Tygara skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-042/2023

Svar
uppá

skrivliga fyrispurningur nr. 52-042/2023 eftir tingskipanini til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum, frá Bárði á Lakjuni, løgtingsmanni, um samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum

.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýriskvinnan viðgjørt ansingarsamsýningina av eldri og óhjálpnum persónum saman við kommununum?
2. Um so er, eru partarnir so komnir til eina semju um samsýningina?
3. Um landsstýriskvinnan ikki hevur viðgjørt málið saman við kommunum, nær er so ætlanin at fáa tað gjørt?

Svar:
Sum víst á í svari til Bárð Nielsen, løgtingsmann, upp á § 52a fyrispurning um ansingarsamsýning í juli 2023, sendi fyrrverandi landsstýrismaður í almannamálum kunngerð um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum til hoyringar. Ætlanin var, at samsýningin skuldi hækka upp í 18.000 kr.

Í sambandi við hoyringina vístu kommunurnar á, at kunngerðin er ógreið og manglar nógvar ásetingar, og tørvur er á grundleggjandi at endurskoða kunngerðina. Kommunurnar mæltu frá at dagføra upphæddina, uttan samstundis at dagføra sjálva kunngerðina. Talan er um eitt arbeiði, sum krevur nakað av arbeiðsorku og í løtuni er arbeiðsorkan í ráðnum avmarkað.

Landsstýriskvinnan er í gongd við at fyrireika ein fund við kommunurnar, har landsstýriskvinnan millum annað ynskir at umrøða, hvussu arbeiðið við at endurskoða kunngerðina um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum skal gerast og hvørjar broytingar kommunurnar ynskja.

Tórshavn, 20. november 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna